# Fýra metrar høgur kavamaður

**Næmingar í 10. flokkunum á Venjingarskúlanum gjørdi ikki mætari enn at gera ein fýra metur høgan kavamann í nógva kavanum mikudagin**

KAVAMAÐUR
*Heri á Rógvi*

Tað byrjaði við, at ein lærari var innikavaður á Norðadali, og tískil høvdu næmingarnir frí tveir teir fyrstu tímarnar. Onkur av hinum lærarunum var sjúkur, so tað líktist meira og meira einum frídegi. Nakrir av næmingunum í 10.a og 10.b fóru út í kavan at spæla, og áðrenn lang tíð gekk vóru tey farin undir at gera ein kavamann. Tá tann innikavaði lærarin loksins kom aftur í skúla, vóru næmingarnir longu farnir út í kavan, og hann og hinir lærarnir hjá 10. flokkunum mikudagin lótu bara næmingarnir halda áfram við at gera teirra kavamann.

Eini tíggju næmingar í tveimum báðum flokkunum stríddust av øllum alvi fyri at fáa kavamannin so stóran sum gjørligt. Tá avtornaði var kavamaðurin vorðin fýra metrar høgur. Roknað verður við, at hetta er met. Kavamaðurin fekk tó stutta livitíð, tí í myrkrinum hevði onkur hvølt kavamannin, soleiðis at teir fýra metrarnir vórðu javnaðir við jørðina, men hetta taldist framvegis sum ein sjáldsom kavahending ein sjáldsama góðan kavadag. Sosialurin ynskir næmingunum til lukku við avrikinum.



*Hesin kavamaðurin gjørdist fýra metrar høgur, og roknað verður við, at talan er um met í Føroyum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Redaktiónin á Argjum stongd seinnapartin

Í sambandi við móttøkuna á nýggju redaktiónini hjá Sosialinum í Saltangará í dag, verður blaðhúsið á Argjum stongt frá kl 13:30.

**Blaðstjórin**


TAÐ ER SO NÓGV LÆTTARI...




RIMMAR PÁSKA DRÁTTUR

Stóri páskadrátturin í V4 verður leygarkvøldið 23. mars.

Tá verður eisini drigið um EYKA-VINNINGIN, sum er 6.000 kr. um mánaðin í eitt heilt ár.

Fleiri seðlar - størri møguleiki

komið og spælið við!

SANSIR - TEL 355 355



Rør&Blikk

RØR & BLIKKSMIÐUR

Vegna vaksandi virksemi verður søkt eftir fólki at arbeiða innan rør og blikksmíð

Góð løn

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf.: 322 999 far.: 225 345

Rør & Blikk fast umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svinjihylar.

Rør & Blikk
Undir Gráasteini 65 · 100 Tórshavn
tlf. 322 999 · far. 225 345
www.rorblikk.fo






Øll kunnu keypa virðisbrøv

Mangir løkir smáir gera stórar áir, siga vit. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum. Ganga fleiri saman um at gera íløgur, kunnu tey fáa teir fyrimunir, sum størri íleggjarar fáa. Íløguprógv kunnu keypast fyri smærri upphæddir – heilt niður í 1.000 krónur. Kaupthing hevur fleiri íløgufeløg at velja ímillum – t.d. feløgini »Norrøn partabrøv« og »Lánsbrøv í donskum krónum«.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn • tel. 35 15 00 • fax 35 15 01 • www.kaupthing.fo

SANSIR TEL 355 355